


# Auto Service umboðar Chevrolet

Frá 1. juni 2009 er verður tað Auto Service, sum umboðar Chevrolet bilar í Føroyum.

Síðan VR-Bilar góvust á nýggjárinum, hava Chevrolet einki umboð havt í Føroyum. Chevrolet Danmark A/S vendu sær til P/F Auto Service um at umboða sínar bilar í Føroyum. Eftir samráðingar millum partarnar í eina tíð er nú alt komið upp á pláss, og frá 1. juni er Auto Service umboð fyri Chevrolet í Føroum.

Árni Rasmussen, stjóri hjá Auto Service, sigur, at teir síggja nógvar møguleikar í Chevrolet. Serliga tí at nógv nýggj modell eru á veg. Um miðjan juni kemur Chevrolet Cruze, sum fær sera góð ummæli frá motorjournalistum, og fyrst í komandi ári fer ein heilt nýggjur Chevrolet Spark at avloysa núverandi Matiz. Sum nakað nýtt fáa vit nú eisini møguleika at selja nýggjar bilar fyri undir 100.000 krónur.

*mg*




*Chevrolet Cruze kemur um miðjan juni*



*Chevrolet Spark*

# Hjalte og Nina í MC-Søluni



*Nina Rasmussen og Hjalte Tin saman við Anders Berg frá MC-Søluni*

Í sambandi við vitjanina hjá donsku hjúnunum Hjalte Tin og Nina Rasmussen í Føroyum, skipaði MC-Sølan týsdagin fyri eini hugnaløtu, har fólk kundu koma at heilsa upp á tey og evt. seta teimum spurningar.

Hjalte og Nina hava ferðast kring landið og m.a. hildið fyrilestur í Norðurlandahúsinum, um hvussu tey í umleið 30 ár hava ferðast í nógvum londum kring um í heiminum á motorsúkklu.

Hóast tey hava ferðast í nógvum ymiskum londum og upplivað nógv, halda tey at Føroyar er eitt sera vakurt oyggjaland við eini og sermerktari og flottari náttúru.

Tey skulu m.a. til Dímunar, áðrenn tey fara heim aftur til Danmarkar hósdagin.

*mg*



Føroya Tele Cup:

## Føroyameistara-kapping í Go Kart

Motorsúkkluhandilin AD-Import fer í næstum at skipa fyri føroyameistarakapping í Go Kart koyring millum virkir. Kappingin, sum hevur heitið Føroya Tele Cup, verður skipað við einum innleiðandi umfari, og síðan eini kapping um meistaraheitið.

Innleiðandi umfarið er ein innanhýsis kapping fyri hvørja einstaka tilmeldaða fyritøku, sum so eftir hetta velur ein teirra at umboða fyritøkuna í føroyameistarakappingini, sum verður hildin í seinna tíðarskeiði.

Kappingin fer fram í hesum tíðarskeiðunum 20.-21. juni og 27.-28. juni. Føroyameistarakappingin verður hildin seinna luttøkudagin. Báðar kappingarnar vera á økinum uttan fyri hjá Føroya Tele í Hoyvík.

Fyrireikararnir siga, at ætlanin er at gera hetta til eitt afturvendandi tiltak, og verður eitt ferðasteyp latið til vinnandi fyritøkuna. Hetta ferðasteyp kann einans ognast eftir at sama fyritøka hevur vunnið føroyameistaraheitið 3 ár á rað ella 5 ár samanlagt.

Meira fæst at vita á heimasíðuni: www.ad-import.fo.